# Jólaplattar fáast hjá




**pf Maria Poulsen & Co.**

FO 110 Tórshavn - 31 20 01



# Frá Eydnuni

Í ár vera tey vælumtóktu jólaborðhaldini, leygarkvøldini 1. og 8. desember. Felags fyri bæði kvøldini er stór buffet við min. 16 ymiskum heitum og køldum rættum, skemtiligt undirhald og felagssangur.

Aftaná borðhaldið verður almennur dansur.

Leygarkvøldið 1. desember spælir LM-Band til dansin

Leygarkvøldið 8. desembar spælir Trio til dansin

Kostnaður fyri alt kvøldið er 300,-
(Atgongumerkið skulu verða goldin seinast eina viku áðrenn).

**EYDNAN** á Oyrarbakka


# Programmfólk
## til dokumentarsendingar

Vegna farloyvi er eitt avloysarastarv sum programmfólk á mentunardeildini í Sjónvarpi Føroya leyst at søkja. Starvstíðin er 1. januar - 1. november, 2002.

**Uppgávur:**
Tú skalt gera dokumentarsendingar við denti á at lýsa persónssøgur úr nútíðarsamfelagnum. Vit sóknast eftir einum kreativum medarbeiðara, við hollum kunnleika til føroysk samfelags- og mentanarviðurskifti.

**Útbúgvingarkrøv og royndir:**
Viðkomandi útbúgving innan fjølmiðlar ella frá hægri lærustovni. Royndir frá mentunar- og/ella fjølmiðlaarbeiði. Royndir við projektarbeiði. Vit rokna harafturat við, at tú hevur góðan kunnleika til føroyskt mál og góð samstarvs-evni, og at tú arbeiðir sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at tú hevur førleikan eisini at gera tíðindainnsløg av og á.

**Løn og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Starvið verður lønt í lønar-bólki 6.

Umsókn við prógvum, viðmælum og CV verður at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, **og skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 23. november.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sjónvarp Føroya, tel 340400, og spyrja eftir Ivan Niclasen, deildarleiðara, ella Mikkjal Helmsdal, stjóra.

**Sjónvarp Føroya**

*Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Um helvtin av inntøkunum stava frá hyggjaragjaldi og hin helvtin frá handilsligum virksemi.*


Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg



# Dansiskeið
við Anna Kirstin av Tvøroyri

**Alment dansiskeið verður í fimleikarhøllini í Hoydølum vikuskiftið 9. og 10. november 2001**

Undirvíst verður í eingilskum dansi: Foxtrot, Quick-Step, Rock 'n' Roll, Valsi og Linjudansi.
Skeiðið er fyri øll dansiáhugað: Pør/støk, børn/ung, nýbyrjarar og vandar dansarar. Aldursmark 7 ár.

Vandir dansarir verða undirvístir í tango, saktavals og rock'n'roll

**Til foreldur:** Latið børn tykkara læra at dansa. Tað er stuttligt og kropsmennandi

**Dansað verður í 4 holdum:**
Hold 1: Børn 7-10 ár
Hold 2: Børn 11-14 ár
Hold 3: Nýbyrjarar
Hold 4: Vandir dansarar

**Kostnaður fyri skeiðið:**
Børn: kr. 75,-
Vaksin: kr. 150,-

**Fríggjadagin 9. nov.**
Hold 1: kl. 16.00-17.00
Hold 2: kl. 17.15-18.45
Hold 3: kl. 19.15-21.00
Hold 4: kl. 21.15-23.00

**Leygardagin 10. nov.**
Hold 1: kl. 12.00-13.15
Hold 2: kl. 13.30-15.00
Hold 3: kl. 15.30-17.15
Hold 4: kl. 17.30-19.15


# Fulltrúi til skrivstovuna hjá Dátueftirlitinum

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingar-myndugleiki, sum vísir til Løgmansskrivstovuna.

Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðslu-skrivstovu og hevur eftirlit við allari viðgerð, sum lógin um viðgerð av persónsupplýsingum fevnir um.

Dagliga virksemi hjá dátueftirlitinum verður røkt av avgreiðsluskrivstovuni. Ráðið, sum landsstýrismaðurin setir, er skipað við formanni og 2 øðrum limum. Ráðið ger egna reglugerð og nærri reglur um arbeiðsbýti millum ráð og avgreiðsluskrivstovu.

Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er fyrisiting av persónsupplýsingarlógini.

Eftirlitið hevur av sínum eintingum ella eftir klagu frá einum skrásettum eftirlit við, at øll viðgerð, sum lógin fevnir um, bert fer fram í samsvari við lógina og reglum ásettum við heimild í lógini.

Av øðrum uppgávun kann nevnast vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum viðvíkjandi skráseting og víðarigeving av persónsupplýsingum, viðgerð av klagum og málum, sum ráðið av sínum eintingum hevur tikið upp, og viðgerð av fráboðanum og umsóknum um loyvir.

Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum hjá almennum myndugleikum og hjá privatum.

Dátueftirlitið skal geva ummæli til ætlaða løggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum og annars virka fyri góðum dátuviðgerðarsiði.

Við hesum verður søkt eftir fulltrúa til skrivstovuna hjá dátueftirlitinum.

**Uppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar so sum málsviðgerð, vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum, fyrireiking og tilrættisleggjan av fundum og málsviðgerð hjá ráðnum, dagføring av heimasíðuni við kunnandi tilfari, gera ársfrágreiðing og virkisætlan.

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava útbúgving frá hægri læristovni. Tó kunnu eisini tey søkja, ið væntandi verða liðug næsta summar.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera miðvísir og hava góð samstarvsevni. Umsøkjarar skulu harumframt hava góðan kunnleika til edv og til føroyskt mál.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

**Vit kunnu bjóða**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum, har møguleiki er fyri at hava ávirkan á arbeiðsuppgávurnar. Góðir møguleikar fyri upplæring og eftirútbúgving.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Rúna Joensen, deildarstjóra ella Ingunn Eiriksdóttir fulltrúa tlf. 351010, fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast
Løgmansskrivstovuni
Tinganes
Postboks 64
110 Tórshavn

og skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi á middegi fríggjadagin 9. november 2001.


# 50 ÁRA
## FØÐINGARDAGSTILBOÐ
galdandi frá mánadegi 29. oktober til mánadagin 12. november

**RESTAURANT HAFNIA**
kl. 12.00 - 21.30

*Rækjucocktail ella Laksaroulada & Jubileumsbúffur við bátaeplum og grønmeti*

*2 rættir bert 98,-*

**HAFNIA LOUNGE**
kl. 14.00 - 17.30

*Kaffi/ te/ kakao & lagkøka*

*bert 28,-*

**Hotellið í miðbýnum**
**Tel 31 32 33**

HOTEL HAFNIA


# Serflutningsbussur hjá Klaksvíkar Kommunu til sølu

Serflutningsbussur kommununnar verður hervið lýstur til sølu, um hóskandi boð fæst.

Bussurin, sum er av merkinum Ford Transit 2500 T/D, er góðkendur til 15 persónar, hevur lyft til rørslutarnað og myndatól aftan. Hann er skrásettur fyrstu ferð í mai 1999.

Áhugað kunnu venda sær til Jancy Biskopstø Klein á Sosialu Deild, telefon 456388, ella Jan Askham í Smiðjuni, telefon 456387.

**Klaksvíkar Kommuna**

# Maskinmaður hjá PureWater

**Til maskindeild okkara søkja vit eftir maskinmanni**

**Starvið**
Sum maskinmaður fært tú, sum partur av maskindeild felagsins, ábyrgd av rakstri og viðlíkahaldi av maskinum og bygningi.

**Høvuðsuppgávur**
- Tryggja at viðlíkahald av maskinum og bygningi verður gjørt til ásetta tíð, uttan at nerva framleiðsluna
- Tryggja at teknisk viðurskifti á virkinum eru á einum høgum tekniskum støði.
- Verða við til at skipa og menna framleiðsluskipanina, soleiðis at framleiðslan verður so rationel sum til ber, og í hesum sambandi verða við til at finna nýggjar leiðir.
- At verða við til at skapa eitt trygt og gott arbeiðspláss, har arbeiðsfelagar koma at trívast.

**Førleiki**
Vit rokna við at tú hevur handverkaraútbúgving við møguligum yvirbygningi.
Kunnleiki til køli- og elskipanir er ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Maskinmaðurin er partur av maskindeild felagsins, sum hevur beinleiðis tilvísing til leiðslu felagsins

Lønin verður sett eftir útbúgving og royndum.
Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**Sp/f PureWater**
Faktorsvegur 6
Postboks 66
700 Klaksvík

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og freistin at lata inn umsókn er 15. november 2001.

PureWater Seafoods

*PureWater er eitt virkið sum framleiðir og selur portiónir og blokkvørur úr laksi, upsa, hýsu og toski. Tað arbeiða 60 fólk á virkinum*